

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 10 - 2012

# Oljusjeikarnir úr Hoydølum til London at kappast

Jógvan, Bergur og Jóna á Føroya Studentaskúla í Hoydølum skulu umboða Føroyar í London, tá finala verður í spennandi oljukapping. Tað gjørdust Oljusjeikarnir av Føroya Studentaskúla, ið struku avstað við sigrinum í PetroChallenge Føroyar 2012, sum var á trimum miðnámsskúlum hósdagin og fríggjadagin. 135 næmingar frá Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Føroya Handilsskúli Kambsdali og Føroya Handilsskúli Tórshavn luttóku á tíggjunda PetroChallenge skeiðinum, sum endaði við eini kapping fríggjadagin 26. oktober. Í einum tøttum spurti vóru tað tey trý Jógvan Mellemgaard, Bergur Djurhuus og Jóna Danielsen sum vóru dugnaligast og vunnu. Tey gjørdu fleiri stór olju- og gassfund, og harafturat hepnar íløgur í onnur leitiloyvi, og høvdu tí hægsta virðið, tá avtornaði. Oljusjeikarnir umboða Føroyar í altjóða PetroChallenge finaluni á Imperial College í London í januar 2013. Bólkar av Føroya Handilsskúli Tórshavn hava vunnið føroysku kappingina seinastu nógvu ferðirnar, men hesu ferð eydnaðist tað so ikki. Seinast ein bólkur í Hoydølum vann, var tað eisini Búgvi Poulsen, sum var lærari og vegleiðari. Fremstu fimm bólkarnir vóru - 1. Oljusjeikarnir (Føroya Studentaskúli og HF-skeið) - Jógvan Mellemgaard, Bergur Djurhuus, Jóna Danielsen 2. Glíður í Olju (Føroya Studentaskúli og HF-skeið) - Brestir Mikkelsen, Helena A. Davidsen, Ríkin Napoleon Djurhuus, Borgný S. Hansen 3. KambOil 04 (Føroya Handilsskúli Kambsdalur) - Allan Olsen, Uni Jacobsen, Hendrik á Fríðriksmørk, Sverri Jensen 4. Oilangutangs (Føroya Studentaskúli og HF-skeið) - Theodor Larsen, Gilli Niclasen Lorenzen, Bjørn M. Mohr 5. Sp/f Olja og Sóvrit Har (Føroya Studentaskúli og HF-skeið) - Bjørgfinnur Winther, John Jákup Lindquist, Teitur V. Guttesen Nevnast kann, at tað eydnaðist 29 av 31 bólkum at fáa yvirskot av leitivirkseminum, og tað í sær sjálvum er eitt sera gott úrslit. Statoil stuðlar PetroChallenge Føroyar, sum er fyriskipað av Simprentis í

samstarvi við FOÍB. Stór myndafrásøgn frá Føroya Handilsskúla í Havn, Føroya Studentaskúla og HF skeiði í Hoydølum og Føroya Handilsskúla á Kambsdali verður á oljan.fo leygardagin. Myndir Oljusjeikarnir úr Føroya Studentaskúla vunnu og skulu til London at kappast Glíður í Olju úr Føroya Studentaskúla gjørdist nr. 2 Oilangutangs úr Føroya Studentaskúla nr. 4 Myndatøka oljan.fo/Jan Müller